## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og suðri og møguliga regn ella mjørki . Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin gul av ymsum ættum og regn. Seinnapartin upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin fellur niður í eini 2 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

# List á alnetinum

**Eli Smith, listarmaður í Havn, sýnir fram myndir sínar á alnótini**

LIST
*Eirikur Lindenskov*

Eli Smith, listarmaður, lat í september upp framsýning á heimasíðuni hjá sær, sum eitur www.eli.fo.

Í hesum døgum verða flestu myndirnar skiftar út, og nýggjar myndir koma á heimasíðuna, tó verður hon ikki heilt klár fyrr enn 18. mars, sigur Eli Smith.

Hesaferð hevur Eli Smith ein gestalistamann við, tað er svágurin, Ólavur á Váli, sum eisini teknar, hann hevur nakrar myndir við á heimasíðuni.

Á heimasíðuni, sum eisini er á enskum og donskum, er eisini ein linkur til Ferðaráð Føroya, so fólk aðrastaðni í verðini kunnu fáa meira at vita um Føroyar.

– At hava listaframsýning á heimasíðuni er ein góður møguleiki at koma út til fólk víða hvar í heiminum, sum ikki kunnu koma at hyggja eftir myndunum á staðnum, sigur Eli Smith.



*Hendan myndin er av Eli við trý ára gomlu dóttrini, Sigrun, sum er sovnað*



*Hesa myndina hevur Eli málað av tí næstelsta beiggja sínum, Jóhan Smith, sum er uppvaksin í Tórshavn, hann hevur eisini málað nógvar oljumálningar, bæði av landsløgum og portrettum, hesi hanga víða hvar í Føroyum bæði í heimum og stovnum.*

Tað ber eisini til at keypa gjøgnum alnótina. So kunnu fólk hyggja í frið og náðum. Tey, sum kundu hugsað sær at hugt nærri eftir onkrari mynd og hava møguleika fyri tí, eru jú vælkomin heim til Eli í Børkugøtu 27, Tórshavn at hyggja eftir myndunum, sigur hann.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷8 |
| Nuuk | ÷10 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavik | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷2 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 16 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1032 hPa. yvir Skagerrak fer spakuliga eystureftir.




Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/03 kl. 06[00]– 14/03 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 2,3°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/03 kl. 06[00]– 14/03 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 27,8 mm

**BILLUTIR**

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR

**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666

## VESTFALLSKYRRINDI

14. mars: Tendring/Mánin longst frá jørðini
22. mars: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna— sundi fp. | sp. | Mykines— firði fp. | sp. | Nólsoyar— firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna— sundi fp. | sp. | Fugloyar— firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. mar | 07.44 | 20.02 | 06.44 | 19.02 | 06.59 | 19.17 | 09.44 | 22.02 | 10.44 | 23.02 | 05.59 | 18.17 | 04.59 | 17.17 | 07.59 | 20.17 | 08.59 | 21.17 | 07.29 | 19.47 | 08.44 | 21.02 |
| 16. mar | 08.21 | 20.38 | 07.21 | 19.38 | 07.36 | 19.53 | 10.21 | 22.38 | 11.21 | 23.38 | 06.36 | 18.53 | 05.36 | 17.53 | 08.36 | 20.53 | 09.36 | 21.53 | 08.06 | 20.23 | 09.21 | 21.38 |
| 17. mar | 08.58 | 21.18 | 07.58 | 20.18 | 08.13 | 20.33 | 10.58 | 23.18 | 11.58 | — | 07.13 | 19.33 | 06.13 | 18.33 | 09.13 | 21.33 | 10.13 | 22.33 | 08.43 | 21.03 | 09.58 | 22.18 |
| 18. mar | 09.36 | 21.54 | 08.36 | 20.54 | 08.51 | 21.09 | 11.36 | 23.54 | 00.18 | 12.36 | 07.51 | 20.09 | 06.51 | 19.09 | 09.51 | 22.09 | 10.51 | 23.09 | 09.21 | 21.39 | 10.36 | 22.54 |

5 707265 100050 >